## Methøgur gullprísur

Triðja dagin á rað hevur gullprísurin sett met. Í morgun vann prísurin seg upp á 1.059 dollarar pr. ounce, svarandi til 172.592 krónur fyri kilo. Seinnu árini er gullprísurin meira enn tvífaldaður. Búskaparliga niðurgongdin hevur merkt, at íleggjarar heldur vilja seta pening í føst virði, og nú dollarkursurin er komin undir álvarsligt trýst seinastu dagarnar, er gullprísurin lopin enn longur upp.



## Rás2 í Íslandi

Klokkan 9 í morgin fer Rás2 at varpa ljós á felags íslendsku-føroysku søguna og samleikan. Fyri stuttum skipaði Smyril Line fyri forkunnugari ferð til Eysturlandið í Íslandi, har Óli Jacobsen var ferðaleiðari. Á ferðini var farið aftur á slóðina hjá føroyingum, sum hava livað og virkað í Íslandi í 20. Øld. Leo Poulsen var við á ferðini, og hann gjørdi samrøður og upptøkur. Hesar samrøður og upptøkur vera at hoyra á Rás2 í morgin, millum klokkan 9 og 10.

# Løgreglan hevur kannað nógvar bilar

**Tað er vorðið kostnaðarmikið hjá fólki ikki at hava bilin í lagi – ella ikki at fylgja ásetingunum í ferðslulógini, tá tú koyrir í bili. Hevur tú einki koyrikort uppi á tær, kostar tað eina bót upp á 500 krónur**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinnapartin mánadagin gjørdi løgreglan ferðslukanningar á Kaldbaksvegnum og seinni um kvøldið eisini í býnum í Havn.

Tilsamans 187 bilar vórðu kannaðir á Kaldbaksvegnum, og 21 frágreiðingar vórðu skrivaðar fyri ymisk viðurskifti, sum ikki vóru í lagi.

Allar 21 frágreiðingarnar føra til bøtur, og haraftrat gav løgreglan eisini 24 átalur fyri eitt nú einstakar perur, ið vantaðu á bilum.

Tíggju bilførarar høvdu ikki koyrikortið uppi á sær, og hinar frágreiðingarnar vórðu skrivaðar, tí bilar høvdu eitt nú lyktafeilir ella ov vánalig dekk.



*Tað kann gerast kostnaðarmikið at koyra í bili, sum ikki er í lagi – og tað kostar klipp, um børn ikki sita í trygdarbelti*

### Klipp í kortið

Mánakvøldið kannaði løgreglan eisini 39 bilar í býnum í Havn, og tá vórðu 8 frágreiðingar skrivaðar, seks fyri lyktafeilir, ein fyri vantandi trygdarbelti og ein fyri, at barn ikki sat í trygdarbelti.

Løgreglan sigur, at ein bilførari í hesum báðum kanningunum mánadagin fekk klipp, og tað var bilførarin, sum ikki hevði barnið sitandi í trygdarbelti.

Eftir herðingina í ferðslulógini, sum kom í gildi 1. oktober í ár, er minsta bótin fyri brot á ferðslureglurnar 500 krónur.

- Soleiðis kostar tað eisini 500 krónur, um tú sum bilførari ikki hevur koyrikortið uppi á tær, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

### Eisini í Vágum

Hin 1. oktober, tá broytingarnar í ferðslulógini komu í gildi, kannaði løgreglan eisini bilar í Vágum.

28 bilar vórðu kannaðir, og tá skrivaði løgreglan tilsamans fimm frágreiðingar fyri ymiskt, sum ikki var í lagi, eins og onkur átala eisini varð givin.



# Tvey línuskip undan Íslandi

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag landa tvey línuskip í Klaksvík. Tey eru Klakkur og Kvikk, sum báðir hava verið undir Íslandi hendan túrin. Klakkur hevur 115.000 pund og Kvikk 153.000 pund.

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík siga tey, at meginparturin av veiðini hjá Klakki og Kvikk er longa og brosma, men nakað er eisini av toski.

Línuskipið Helena hevur eisini landað sløk 80.000 pund í Klaksvík í vikuni.

# Landing kastar av sær

**Landarar í Klaksvík hava arbeitt upp í 17-18 tímar um samdøgnið. Síðan eru menn farnir heim at sova, men lagt hevur verið til brots aftur morgunin eftir klokkan 06**

LANDING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Tað hevur gingið væl at fáa fólk at landa, nú søguliga stóra lastin hjá Skálabergi skuldi leggjast upp, sigur Pól Fuglø, landingarformaður í Klaksvík*

Seinasti túrurin hjá flakatrolaranum Skálabergi var rættiliga góður. Skipið var fult undir lúkurnar, og lastin vá millum 1150 og 1200 tons. Veiðan er løgd upp og skild í vørunummur í Norðurhavnini í Klaksvík, har 30 landarar hjá Landingarmiðstøð Føroya hava havt rættiliga langar arbeiðsdagar.

### 30 mans í sving

Pól Fuglø, landingarformaður hjá Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík, sigur, at teir 30 landararnir byrjaðu at landa Skálaberg seinasta leygardag klokkan 15, og klokkan 22 í týskvøldið í hesi vikuni var lastin tóm.

Hann sigur, at landað hevur verið upp í 17-18 tímar um samdøgnið. Síðan eru menn farnir heim at sova, men lagt hevur verið til brots aftur morgunin eftir klokkan 06.

Landingarformaðurin vísir á, at veiðan hjá Skálabergi er býtt upp í umleið 30 vørunummur.

- Sum skilst, er stóra lastin longu seld og fer avstað í hesi vikuni, sigur hann.

Landingarliðið hjá Landingarmiðstøðini í Klaksvík telir vanliga 8-12 menn, og tá ið mest er at gera við bryggjukantin, plagar talið av landarum at liggja um 16.

Pól Fuglø sigur, at tað hevur gingið væl at fáa fólk at landa, nú veiðan hjá Skálabergi skuldi leggjast upp.

### Norðborg landar

Tá vit tosaðu við landingarformannin í gjár, segði hann, at Norðborg er á veg á Klaksvík við umleið 1300 tonsum av frystari vøru, sum landararnir eisini skulu fáa upp úr skipinum og inn í frystigoymsluna í Ánunum.

Samanviðvanliguísfiskalandingunum við Kósabrúnna, sum eru færri og fleiri gjøgnum vikurnar, má sigast, at landing seinastu tíðina hevur givið monnum í Klaksvík góðan pening.